


*Savnsmynd*

## Bensinstuldur í Gundadali

Fríggjamorgunin 30.04, var ein bilførarai meldaður av starvsfólkinum á Statoilstøðini í Gundadali. Førarin fylti sær bilin við bensini, og koyrdi síðan avstað uttan at gjalda.

Løgreglan fann tó føraran ein tíma seinni, og skuldsetti hann fyri bensinstuldur.

**eys**

## Arbeiðsóhapp

Fríggjadagin 30.04 hendi eitt arbeiðsóhapp. Tað var ein timburmaður, ið skeyt seg í hondina við einum seympistóli.

Maðurin segði, at hann skuldi skifta seymrullu í sínum trykkluftspistóli, tá pistólurin brádliga gekk av, og rakti mannin í fremsta fingur. Maðurin segði seg ikki vita hvussu tað kundi bera til, at pistólurin gekk av. Hann koyrdi tó sjálvur á skaðastovuna, so skaðin var ikki so álvarsamur.

**eys**

## Vold og herverk á Herberginum

Fríggjadagin varð ein maður í Havn meldaður fyri vold. Tað var eitt av arbeiðsfólkunum á Herberginum, sum meldaði. Arbeiðsfólkið varð sligið, tá tað bað mannin um at fara út av Herberginum. Tann sum meldaði, hevði eitt hovið eygað, og nakrar skeinur á eygnalokinum.

Dagin eftir, leygardagin 1. mai, var aftur rok á herberginum. Hesin sami maðurin, sum var meldaður dagin fyri, hirdi eitt ruskstativ ígjøgnum rútin á úthurðini á Herberginum. Rúturin fór í smildur. Starvsfólkið á Herberginum, dugdi ikki at vita orsøkina til, at maðurin breyt rútin. Hann rýmdi av staðnum eftir at hava framt herverkið, men varð tikin av politinum eina løtu seinni.

Maðurin varð skuldsettur fyri vold og herverk. Dómurin verður avgjørdur í rættinum.

**eys**

## Ov høg ferð

Løgreglan var um vikuskiftið úti við lasara og gjørdi ferðmátingar í Kaldbaksbotni. Fimm bilar vórðu tiknir. Teir koyrdu allir millum 115 og 121 km. um tíman.

**eys**

## Herverk á Listaskálanum

Sunnudagin kom fráboðan um, at ein rútur var brotin í Listaskálanum. Talan er um ein stóran rút, 180 X 180, sum er brotin. Løgreglan hevur eingi spor at ganga eftir í hesum málinum.

**eys**

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo
WWW.SMYRIL-LINE.COM

**Harmonikutúrurin**
**á Noregsferðini 6. til 8. september**

**Prísur fyri hvønn úr 800,-**



**Vælumtókti harmonikutúrurin** við Norrönu verður í ár 6. – 8. september, har Fimmbogi Lisberg og Pauli Jacobsen skipa fyri.

Fleiri góð harmonikulið luttaka á túrinum.

Liggið ikki sjóvarfallið av tykkum, men bíleggið ferðina í góðari tíð.

**PRÍSIR**

| | |
|---|---|
| Couchettir | 800,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 900,- |
| 4 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.000,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað innv. | 1.200,- |
| 3 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.400,- |
| 2 koyggjukamar v. wc/bað útv. | 1.700,- |

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Bergen (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).

SMYRIL LINE

## LUS í Havn

Hósdagin 6. maj byrjar tiltakið LUS, sum er stytting fyri Lands Ungdóms Stevnan. Hetta er ein stevna hjá Heimamissiónsungdómi. Hetta er eitt tiltak fyri ung frá 7. flokki og uppeftir. LUS verður hildin annaðhvørt ár, og í ár verður hon hildin í Venjingarskúlanum.

Á skránni verða bíbliutímar, diasshow, drama, áhugatímar, breytir, frítíðartiltøk, tónleikur og kvøldsetur.

Evnið á LUS hesuferð verður: 100%.

Fyrireikararnir siga seg vænta eini 300-350 ungfólk úr øllum landinum.

**eys**

## Fyrilestur um fyribyrging av vanlukkum hjá børnum 0-6 ár

Mánakvøldið 3. maj, skipar felagið hjá barnasjúkrarøktarfrøðingum fyri einum fyrilestri í veitsluhøllini á Landsjúkrahúsinum. Fyrilesturin verður um, hvussu vit kunnu fyribyrgja at børn í aldrinum 0-6 ár koma út fyri vanlukkum bæði heima og á stovnum.

Tað er danska Hanne Lise Grønkjær, sum undirvísir. Hon er heilsusystir og kendur fyrilestrahaldari.

Endamálið er at geva starvsfólkum, foreldrum o.ø. meira kunning um fyribyrging av vanlukkum. Hesin fyrilesturin er ein partur av verkætlanini "Tju hej – sikker leg".

Fyrilesturin er fyri øll, og kostnaðurin er 50 kr.

**eys**

## Høvdið á blokkin

25. maj verður ein ráðstevna í Fólkatinginum, sum Norðuratlantsbólkurin skipar fyri. Heitið á ráðstevnuni verður "Høvdið á blokkin", og evnini verða blokkstuðulsskipanin í ríkisfelagsskapinum, og økonomiski týdningurin av trygdarpolitikkinum í Norðuratlantshavi.

Høvi verður m.a. at hoyra hvussu tað er gingið íslendingum økonomiskt eftir at teir gjørdust sjálvstøðugir, at hoyra nýggj fíggjarlig hugskot fyri Føroyar og Grønland, at hoyra um valutafelagskapir og nýggjan valuta og hoyra hvat nakrir danskir toppolitikarar halda um fíggjarligu framtíðina í ríkisfelagskapinum.

Nógv fólk fara at hava orðið, m.a. ein íslendskur økonomiprofessari, stjórin í danska tjóðbankanum, Lars-Emil Johansen og úr Føroyum verður Hermann Oskarson við á ráðstevnuni.

Ráðstevnan verður hildin á Christiansborg týsdagin 25 maj. 2004, avmarkað pláss er.

**eys**

## Lat sodavatnið fara og klænka

**Ein nýggj ensk kanning vísir, at tað ikki skal so nógv til fyri at børn og ung skulu klænka**

KOSTUR OG FITI
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Børn og ung gerast feitari og feitari og sjúkur, sum fyrr bara sóust hjá elsri fólk eru nú eisini at finna millum ungfólk.

Men henda gongdin kann lætt fyribyrjast. Ein nýggj ensk kanning vísir nevniliga, at verður sodavatnið lagt á hillina, verður tað ein munadygg fyribyrgin móti fiti.

Kanningin er gjørd í einum enskum skúla í einum tíðarsekiði uppá 4 ár. Umframt at tað einaferð hvørt árið fingu vitjan av kostráðgeva, fingu tey eisini afturvendandi undirvísing frá flokkslærarunum, har tey vóru mint á, at skifta sodavatnið út við vatn. Hetta vísti seg at minka um dellurnar og smalka miðjurnar.

Sambært "Bedre sundhed for børn og unge", er talið á ov feitum børnum og ungum skjótt vaksandi. Frá 1971 til 1997 vaks talið á ov feitum gentum í aldrinum 14-16 ár frá 4 upp í 10 prosent.

*Kelda: Politikken*



**Minst til mammudagin**
sunnudagin 9. mai.

Tá hevur bakarin opið frá kl. 8.00 – 11.00.



og Fípan frá kl. 8.00 – 16.00





Angus roastbeef
1/2 KILO
$29^{95}$
fyri kg. 59,80



Moyrt Angus Gullasjkjøt
2 KILO
$99^{95}$



Bellaroma pasta
5x500 GR.
$25^{00}$



Food Line rís í kókiposa
500 gr.
$3^{95}$



Food Line Havragrýn
1 KILO
$4^{50}$



Food Line Cornflakes
750 GR.
$18^{00}$



Tabs maskin-uppvask, 30 stk.
1 PAKKI
$14^{95}$



Lovernes konge 1
VHS
$59^{95}$



Sanex kropssápa
750 – 1000 ml.
$36^{00}$



Lotus Embo vesipappír
12 RULLUR
$30^{00}$



Malið kálva- og fleskakjøt
850 GR.
$26^{95}$



Appelsinir ella Grape
10 FYRI
$20^{00}$

Tilboðini eru galdandi frá 04/05 til 08/05 2004

MIKLAGARÐUR